# Eitt reint og ríkt hav

Havið og havsins ríkidømi er lívsgrundarlag føroyinga.

Tilfeingið og umstøðurnar í havinum ávirka liviumstøðurnar á landi almikið.

Tað er umráðandi, at havið er reint og virkið, og verður vart móti ávirkanum, sum kunnu seta havsins vistskipanir í vanda.

- Virksemi á sjógvi og landi skal ikki hava skaðilig árin á vistskipanina í havinum
- Tilfeingið í havinum skal vera ódálkað og heilsugott
- Vistskipanir og lívfrøðiliga margfaldni í havinum skulu varðveitast og verjast.
- Náttúru- og mentanarvirði í havinum og við strendurnar skulu varðveitast og verjast

*Visti tú*
at tú kanst fáa stóra bót, um tað verður staðfest, at tú hevur koyrt burturkast, olju og onnur dálkandi evni í havið?

# LÓGIN

Á vári í 2005 samtykti Føroya løgting nýggja lóg til verju av havumhvørvinum.

Endamálið við lógini er at verja náttúru og umhvørvi, at varðveita lívskor menniskjanna, vistskipanir og djóra- og plantulív.

Í kunngerðum eru reglur um burturbeining av burturkasti, olju, kloakkspillivatni og øðrum evnum í havið.

Øll lóggáva um havumhvørvið er grundað á altjóða reglur, sum eru samtyktar í altjóða sjóvinnufelagsskapinum hjá ST, IMO.

Viðkomandi lóggáva á hesum øki er:

- Løgtingslóg nr. 59 frá 17. mai 2005 um verju av havumhvørvinum
- Kunngerð nr. 122 frá 25. november 2005 um burturbeining av burturkasti frá skipum o.ø.
- Kunngerð nr. 123 frá 25. november 2005 um burturbeining av kloakkspillivatni frá skipum o.ø.
- Kunngerð nr. 124 frá 25. november 2005 um burturbeining av olju frá skipum o.ø.

## Viðkomandi stovnar

Innlendismálaráðið *www.imr.fo*
Heilsufrøðiliga starvsstovan *www.hfs.fo*
Fiskimálaráðið *www.fisk.fo*
Skipaeftirlitið *www.fma.fo*
Sjóbjargingarstøðin *www.mrcc.fo*
Fiskiveiðieftirlitið *www.fve.fo*

SISEKO 351800



# KOYR IKKI Á VESTFALLIÐ

- tak burturkast og olju við til lands!

INNLENDISMÁLARÁÐIÐ
tel 35 80 80 • www.imr.fo

HEILSUFRØÐILIGA STARVSSTOVAN
tel 35 64 00 • www.hfs.fo

*Visti tú*
*– at kanningar hava víst, at 92 % av havhestinum við Føroyar hevur plast í maganum?*

## Burturkast á sjógv

Burturkast frá skipum er ein stórur trupulleiki á havinum og við strendurnar.

Skip og bátar, sum fáa endar, trol og annað um skrúvuna, eru í stórum vanda.

Burturkast, sum verður koyrt í havið, skaðar:
- djóralívið
- havbotnin
- fiskiskapin
- trygdina hjá skipum og manningum

Havið eigur ikki at nýtast sum køstur – tað er vanligt vit og skil.

Bæði føroysk og altjóða lóggáva hevur reglur fyri burturbeining av burturkasti, olju, kloakk-spillivatni, kemikalium og øðrum evnum frá skipum.

Skilaleysa burturbeiningin í havið má steðga.

*Visti tú*
*– at hópur av fugli, kópi o.ø doyr á hvørjum ári eftir at hava etið plast o.a.?*

*Visti tú*
*– at allar havnir hava skyldu til at hava móttøkuskipan fyri øll sløg av burturkasti?*

*Set teg í samband við havnina ella kommununa.*



## Plast og annað burturkast í havið

Bannað er at koyra trol, nylonendar, plast-posar, teymar, oljuklæði og aðrar vørur og lutir, ið innihalda plast og onnur vandamikil evni, í havið.

## Hvat kanst tú gera?

Havið skal ikki nýtast sum "ókeypis" køstur. Ábyrgdarleys handfaring av burturkasti kann kosta okkum dýrt.

Ger goymslu til burturkast, spillolju o.a. umborð.

Tak burturkastið við til lands og avhenda tað til móttøkuskipan í havnini.

**KOYR IKKI Á VESTFALLIÐ! – TAK BURTURKAST OG OLJU VIÐ TIL LANDS**